## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Jóannes Hansen á Toftum 50 ár

Fríggjadagin 19. august rundar ein kendur toftamaður tey fimmti. Tað eru flest øll í Føroyum, sum hava hoyrt navn hansara. Tað sermerkta við hesum arbeiðssama og gávuríka manninum er, at ymisk fólk kenna hann í ymiskum sambondum, sum einki hava hvørt við annað at gera. Hann er studentaskúlalærari í dagliga yrki sínum. Og so er hann ítróttartíðindamaður, høvundur, samfelagsfrøðingur, sjónvarpsviðmerkjari, hagtalssnillingur, vertur í ymiskum tiltøkum, limur í fleiri nevndum og so nógv annað… Men framum alt – ein góður maður, pápi og abbi. Jú, maðurin er sjálvandi Jóannes Hansen – Jóannes á Toftum ella Jóannes hjá Sannu, sum onkur kallar hann, fyri at skilja hendan fryntliga toftamannin út frá fleiri øðrum, ið bera júst sama navn.



Jóannes Anfinnur Hansen er ættaður úr Klaksvík og er uppvaksin har. Hann er føddur tann 19. august 1955, sum miðlingur í einum systkinaflokki uppá trý, harav hini bæði búgva í heimbýnum. Tey eru Hanus, skipari, og Finngerð Joensen, bankakvinna. Foreldur Jóannes eru Karstin Elias Hansen (vanliga nevndur Karstin í Svínoy, 1920-2001) og Ragnhild, f. Joensen í 1927, úr Heimistovu í Svínoy. Foreldrini vuksu bæði upp úti í Svínoy, sjálvt um Karstin hevði røtur sínar á Toftum, har Jóannes sjálvur festi búgv nógv ár seinni.

Longu sum skúladrongur í Klaksvík sýndi Jóannes politikki og samfelagsviðurskiftum stóran áhuga. Hann var eisini raskur at telva og sparka bólt. Jóannes var virkin í KÍ, og hann fekk eisini nakrar dystir á besta liði felagsins í 1. deild í fyrru helvt av sjeytiárunum.

Jóannes fekk studentarhúgvu í 1975. Tað er vert at minna á, at hann í Hoydølum var vitni til nógv umrødda málstríðið, tá ið nakrir studentar bardust fyri sjálvsagda rætti sínum at tosa á móðurmálinum til prøvtøkur.

Jóannes fór á lærarskúla í Havn í 1976. Hann gekk tey fyrstu tvey árini í Føroyum, og so restina niðri á Emdrupborg Seminarium, har hann varð liðugur í 1980. Hann starvaðist árini 1980-1984 sum lærari í Jakobskolen, ið er kristin frískúli á Frederiksberg. Fór so at nema sær víðari útbúgving og gjørdist cand.mag í samfelagsfrøði og landalæru á Roskilde Universitetscenter í 1987. Tað árið flutti familian heim til Føroya, har Jóannes fekk starv sum adjunktur á Studentaskúlanum við Gøtugjógv, sum seinni bleiv fluttur á Kambsdal. Har hevur hann arbeitt síðani, væl umtóktur og dámdur av starvsfeløgum og næmingum.

Ivaleyst øll tey, sum hava gingið til samfelagstímarnar hjá Jóannesi Hansen, kunnu staðfesta – hann er ein tann besti lærarin, tey nakrantíð hava havt. Altíð fyrikomandi og í góðum lag, væl fyrireikaður, dugir toftamaðurin lýtaleyst at siga frá øllum viðkomandi evnum. Pedagogiskar royndir frá undirvísing í fólkaskúla og framúr góðar talugávur, blandaðar við ómetaligari almennari vitan hjá Jóannesi geva einum sanna fragd av at sita til tímar hansara.

Áhugin fyri altjóða samfelagsviðurskiftum leiddi Jóannes til Onglands, har hann var á ársskeiði í politikki og fjølmiðlum í 1995-1996 á Brooks University í Oxford.

Jóannes hevur eisini verið virkin í føroyskum kommunupolitikki. Í 1992 varð hann valdur í stýrið í Nes kommunu og sat valskeiðið 1996-2000 sum næstformaður.

Nógv kenna Jóannes frá sjónvarpsvalsendingum, har hann á sín eyðkenna, siðiliga hátt greiðir hyggjarum frá tendensum í valstríðnum, framgongdum og afturgongdum hjá flokkunum í valdømum og ymsum partapolitiskum rákum í sambandi við valið. Tað er ringt, um ikki ógjørligt, at avdúka, hvønn flokk maðurin sjálvur hevði valt hendan dagin – sum ein framúr góður samfelagsfrøðingur og journalistur í einum, megnar Jóannes so meistarliga at vera uttanveltaður og halda lágan profil. Tað er einki at ivast í, at luttøkan hjá Jóannesi Hansen ger valsendingarnar uppaftur meira spennandi og áhugaverdar.

Jóannes hevur – saman við øðrum serfrøðingum innan altjóða rætt og altjóða politikk – í fleiri ár verið virkin í Grundlógarnevndini, ið bleiv sett av fullveldissamgonguni til tess at fyrireika teirri føroysku tjóðuni eina grundlóg.

Tað var sjálvandi ikki av tilvild, at Jóannes á sinni átók sær uppgávuna at savna og samskipa valtøl, sum seinni gjørdist 3. bind av framúrskarandi útgávuni »Føroya Løgting 150 ár«. Tað eru sera fá, sum kenna og minnast hagtalsliga partin av nýggjari politisku søgu føroyinga so væl, sum samfelagsfrøðingurin av Toftum ger.

Hugin til pennin hevur Jóannes altíð havt. Longu miðskeiðis í sjeytiárunum var tann ungi klaksvíkingurin blaðstjóri á Norðlýsinum í eitt skifti, áðrenn hann fór suður til Havnar at lesa víðari. Eisini hevur fyrrverandi KÍ-leikarin fylgt nógv við fótbólti – bæði føroyskum og útlendskum.

Soleiðis fingu føroyingar gleði av at kunna lesa í Sosialinum altíð áhugaverdar ítróttargreinar og stubbar hjá »-jh-« og »-nn-«.

Klaksvíkingurin á Toftum leggur sjálvandi størsta dentin á fótbólt, tó skrivar hann eisini um kappróður og so onkra hendingagrein um aðra ítrótt.

Sosialurin hevur í mong ár verið so heppin at kalla annað arbeiðsplássið hjá Jóannesi, men hann hevur eisini skrivað tilfar til nógvar leikskráir hjá B68 og landsliðnum. Jóannes var í fleiri ár talsmaður hjá FSF og stóð fyri tíðindafundum eftir landsdystir hjá fótbóltslandsliðnum.

Føroyska fótbóltslandsliðið er hjartabarnið hjá tíðindamanninum Jóannesi Hansen. Jugoslavia og Russland, Kýpros og Írland og aðrastaðni við ferðaðist hann við fremsta føroyska umboði úti í Europa og sendi heim sínar frálíku frásagnir um dystirnar. Sum úrslit av tí gav Jóannes sjálvur annar út »Landsliðssøguna í 10 ár« í 1997.

Kortini man størsta verk Jóannesar innan ítróttarjournalistikk vera Fótbóltsárbókin, sum hann saman við øðrum gav út árini 1992-2003. Jóannes kom uppí hesa útgávuna í 1993, og hann var at siga høvuðskraftin aftanfyri, líka til hon – tíverri fyri so mong – helt uppat. Í eitt heilt tíggjuáraskeið hevði árbókin verið yndisjólagáva hjá teimum flestu fótbóltsáhugaðu í Føroyum.

Í útlendskum fótbólti hevur Jóannes – serliga í seinastuni – fingið nógvar góðar løtur av tí fína spælinum hjá Arsenal, sum hann altíð hevur hildið við í Onglandi. Í heimligu kappingini munnu KÍ og B68 standa klaksvíkinginum á Toftum næst, sjálvt um hann dugir at krógva hetta í skriving sínari!

Størsta grundin til, at Jóannes valdi at búsetast á Toftum, man vera tann, at hann fekk sær konu haðani. Sanna kemur úr tí stóra barnaflokkinum hjá tí navnframa skiparanum Júst í Túni, f. Hansen, sála, ið sum flest øllum kunnugt var toftamaður, og Maju, f. Guttesen úr Havn. Jóannes og Sanna, sum eru trímenningar í faðirætt (Karstin í Svínoy var av Túni-slagnum av Toftum og systkinabarn Júst), komu saman í 1977, giftust í februar árið eftir og fluttu síðani til Danmarkar í útbúgvingarørindum. Í Keypmannahavn blivu genturnar báðar føddar – Randi kom til verðina tann 9. januar 1979 og Elisabeth tann 1. desember 1983. Randi og maður hennara, runavíkingurin Símun J. Hansen, búleikast nú í danska høvuðstaðnum saman við skjótt eitt ára gomlu Sonnu – ábbadóttir Jóannes. Elisabeth er trúlovað við fuglfirðinginum Jóhan á Lakjuni og býr heima. Tað er merkisvert, at báðar døtur og báðir versynir Sonnu og Jóannes eru tónleikakøn – á ein ella annan hátt – og tey hava øll luttikið í ymiskum framførslum og fløguútgávum!

Heimið hjá Sonnu og Jóannesi við vøkrum útsýni yvir á Strendur er sera hugnaligt og gestablítt. Tað er fáur dagur, at eingin vitjandi bankar uppá.

Hóast nógv upptikin – Sanna er jarðamóður í Havn og maðurin er virkin í so nógvum í senn – hava tey altíð stundir til gestirnar.

Jóannes er persónliga trúgvandi maður, og hetta merkir lív hansara. Hann og Sanna hava sína gongd og eru sannir stuðlar hjá Nebo, sum er Brøðrasamkoma á Toftum. Nógv orka er løgd og stórt arbeiði er gjørt av einari lutfalsliga lítlari samkomu, nú nýtt og størri samkomuhús verður reist í bygdini.

Jóannes hevur so sanniliga stóran og breiðan vinarskara, tí kann roknast við, at nógv koma at heilsa uppá føðingardagsbarnið heima hjá honum nú hóskvøldið.

Góði Jóannes, tær við familjuni verður ynskt hjartaliga tillukku við tí runda degnum, Harrans signing og alt tað besta í framtíðini.

**Ivan E.**

**Dagurin**

**17. august. Anastasius.** Annaðhvørt tann Anastasius, sum var biskupur í Terni í Italiu í 6. øld ella ein Anaststius, ið doyði sum pínsluváttur í Persiu umleið ár 620.




**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin "Nøvn í vikuni" Tel.341800 / 216135 Teldupost: maggi@sosialurin.fo